## Venjaratoymið í HB upp á pláss

HB hevur á heimasíðu síni boðað frá, at teir nú eisini hava sett venjarar til næst besta liðið. Frankie Jensen, sum flutti til Føroya í fjør, og Áki Johansen, sum í fleiri ár hevur virkað sum ungdómsvenjari í felagnum, hava nevnliga skrivað undir tvey-ára sáttmála við felagið. Umframt at venja 1. deildarlið felagsins eru teir báðir eisini partur av toyminum kring Formula-hópin. Har er Rúni Nolsøe høvuðsvenjari, meðan Frankie Jensen verður hjálparvenjari. Fyri at fáa arbeiðið kring tey bæði liðini at ganga upp í eina eind er tó avrátt, at allir tríggir venjararnir eru partur av einum og sama toymi. Á myndini síggjast teir báðir saman við Birgiri Enghamar, formanni í HB.



## Clapson heldur neyvan fram í Føroyum

Klaksvíkingar hildu seg hava fingið ein málverja, tá Paul Clapson kom til landið, men ein slíkan høvdu teir longu, og tí hevur bretin verið partur av KÍ-álopinum seinastu tvey kappingarárini. Tað verður hann tó neyvan í ár. Tosið hevur ljóðað um, at onnur føroysk feløg hava roynt at fáa fatur á spælaranum, men Jákup í Stórustovu, umboðsmaður, sigur, at Clapson helst ikki heldur fram í Føroyum. - Enn er ikki talan um ítøkilig tilboð. Men tað er sannlíkt, at Clapson fer at spæla í onkrum av grannalondum okkara, sigur Jákup í Stórustovu.

# Málveitsla á Stamford Bridge

**Átta mál og tríggjar útvísingar fullu á Stamford Bridge annan jóladag. Og tá Arsenal snávaði kundi Manchester United leggja seg á odda í ensku Premier League**



*Dramatikkurin á Stamford Bridge var øgiligur. Á myndini er tað Zat Knight, sum fær fyrsta av teimum trimum reyðu kortunum, ið fullu í dystinum*

*Mynd: Polfoto/AP*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Manchester United var helst stóri vinnarin um jólini, tá meistararnir við 4-0 sigri á Sunderland og fyrrverandi United-skiparanum, Roy Keane. Ein sigur, sum fekk eyka virði, tá Arsenal ikki megnaði at basa Portsmouth, og tí mátta lata oddasessin frá sær.

Men meira enn hetta var tað dysturin á Stamford Bridge millum Chelsea og Aston Villa, sum tók tær heilt stóru yvirskriftirnar.

Aston Villa setti nevnliga alt fyri eitt ein stóran hvøkk í heimaáskoðararnar, tá Shaun Maloney tvær ferðir sendi bóltin í meskarnar. Beint fyri steðgin minkaði Shevchenko tó um munin við brotssparki, og tá Aston Villa samstundis fekk Zat Knight riknan av vølli, hevði Chelsea betru kortini á hondini til seinna hálvleik.

Her eydnaðist eisini Shevchenko og Alex at skjóta Chelsea framum, men gestirnir vildu ikki geva seg. Og við at avrætta eitt frí-spark fekk Martin Laursen aftur javnvág í roknskapin. 10 minuttir fyri leiklok varð Carvalho rikin av vølli eftir ein ljóta tackling, men tá Ballack í 88. minutti sendi fríspark í netið, tóktist sigurin kortini at enda hjá heimaliðnum. Í yvirtíðini noyddist Ashley Cole tó at bjarga við hondini. Reytt kort til hansara og brotsspark til Aston Villa. Og so kundi Gareth Barry tryggja Aston Villa eitt kærkomið stig.

Í oddinum er støðan nú tann, at Manchester United er á odda við 45 stigum. Arsenal hevur 44 stig, og síðani koma Chelsea og Liverpool við ávikavist 38 og 36 stigum.

### FAKTA

**Úrslitini um jólini**

| | |
|---|---|
| **22. desember** | |
| Arsenal-Tottenham | 2-1 |
| Aston Villa-Man City | 1-1 |
| Bolton-Birmingham | 3-0 |
| Fulham-Wigan | 1-1 |
| Liverpool-Portsmouth | 4-1 |
| Middlesbrough-West Ham | 1-2 |
| Reading-Sunderland | 2-1 |
| **23. desember** | |
| Man Utd-Everton | 2-1 |
| Newcastle-Derby | 2-2 |
| Blackburn-Chelsea | 0-1 |
| **26. desember** | |
| Chelsea-Aston Villa | 4-4 |
| Tottenham-Fulham | 5-1 |
| West Ham-Reading | 1-1 |
| Birmingham-Middlesbrough | 3-0 |
| Derby-Liverpool | 1-2 |
| Everton-Bolton | 2-0 |
| Sunderland-Man Utd | 0-4 |
| Wigan-Newcastle | 1-0 |
| Portsmouth-Arsenal | 0-0 |

**SUNSET KAPPINGIN**

**KVINNUR**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Stjørnan | 10 | 9 | - | 0 | - | 1 | 292 | 218 | 74 | 18 |
| 2 | Neistin | 10 | 7 | - | 0 | - | 3 | 261 | 228 | 33 | 14 |
| 3 | VB | 8 | 4 | - | 1 | - | 3 | 179 | 170 | 9 | 9 |
| 4 | StÍF | 10 | 3 | - | 1 | - | 6 | 220 | 246 | -26 | 7 |
| 5 | Kyndil | 11 | 3 | - | 1 | - | 7 | 237 | 276 | -39 | 7 |
| 6 | VÍF | 11 | 2 | - | 1 | - | 8 | 226 | 277 | -51 | 5 |

Stjørnan-Neistin 32-24 (16-11):

# Stjørnan langt fremst

**Meðan hini liðini vóru farin í jólafrí, gav Stjørnan sær sjálvum eina góða gávu við stórsigri á Neistanum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast tað enn resta tíggju dystir at spæla hjá Stjørnuni, so er lítil ivi um, at tær longu nú hálva vegna hava bílagt sær pláss í FM-finaluni í hondbólti.

Leygardagin undan jólum avgreiddu tær útsetta dystin móti Neistanum, og hesin endaði við tryggum heimasigri til oddaliðið. Frá byrjan var tendringin hjá Stjørnuni í lagi, og so gekk skjótt at revsa mistøkini, sum Neistin framdi á vegnum.

Longu í steðginum vóru fimm mál á muni, og so hevði Stjørnan ikki stórvegis trupulleikar av at halda fast um leiðsluna, sum enntá varð útbygd so heilt hampuliga væl seinastu løtuna.

Við sigrinum er Stjørnan nú á 18 stigum. Níggju stig eru niður til VB á triðja plássinum, men vágskvinnurnar hava tó tveir dystir tilgóðar.

### FAKTA

**Sjtørnan-Neistin 32-24 (16-11)**
10 min: 5-4
20 min: 12-8
40 min: 20-16
50 min: 26-19
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Simona Petersen 10(3), Durita Christoffersen 7, Una Olsen 5, Louisa Andreasen 3, Joan Midjord Djordjevic 3, Bára Skaale Klakstein 3, Anna Kristina Samson 1
**Neistin:** Ása á Neystabø 7(4), Elin Stakksund 6, Anja Heinadóttir 4, Rakul Augustinussen 3, Nicoleta R. Hansen 2
Brotskøst: Stjørnan 3, Neistin 3
**Útvísingar:** Stjørnan 2, Neistin 3
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

## Bjarni fer til KÍ

**Klaksvíkingar hava tryggjað sær Bjarna Jørgensen, sum í fjør var á Argjum, og frammanundan spældi á Skála**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

KÍ hevur gjørt sáttmála við havnarmannin Bjarna Jørgensen, sum næsta kappingarár tí verður at finna í bláu KÍ-troyggjuni.

23 ára gamli Bjarni Jørgensen hevur áður spælt fyri HB, Skála og AB. Hann hevur spælt á ungdómslandsliðunum hjá FSF, og eitt skifti var hann eisini við í bruttohópinum hjá A-landsliðnum. Bjarni hevur spælt sum álopssinnaður miðvallari, og hann kann bæði spæla í síðunum og mitt fyri.

- Eg gleði meg til eina nýggja avbjóðing í KÍ, sum er millum tey stóru feløgini í landinum. KÍ hevur eina miðvísa ætlan fyri framtíðina, og eg eri spentur til at gerast partur av hesari ætlan, sigur Bjarni Jørgensen, sum hevur skrivað undir ein eitt ára sáttmála við KÍ.

## Claus bjargaði Blackpool jólastig

**Fyrrverandi føroyski landsliðsspælarin Claus Bech Jørgensen var stóra hetjan, tá ið Blackpool spældi í næstbestu ensku fótbóltsdeildini annan jóladag**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Annar jóladagur er ein stórur fótbóltsdagur í Onglandi, og hendan dagin helt Claus Bech Jørgensen við sínum fyrsta máli í hesum kappingarárinum.

Blackpool spældi á útivølli ímóti Sheffield United, og fleiri enn 26.000 áskoðarar vóru til dystin. James Beattie, sum fyrst misnýtti brotsspark, legði Sheffield United á odda í fyrra hálvleiki. Tá ið góðir 20 minuttir vóru eftir at spæla javnaði Claus Bech Jørgensen fyri Blackpool, og 1-1 gjørdist úrslitið av dystinum.

Úrslitið var kanska serliga gott, tí Blackpool fekk longu í 8. minutti ein spælara vístan av vøllinum og spældi tí 10 móti 11 meginpartin av tíðini.

Venjarin hjá Sheffield United, Bryan Robson, harmaðist eftir dystin um, at hansara spælarar høvdu misnýtt nógv góð tilboð, men tað løgdu teir fegnu Blackpool-spælararnir líka í. Blackpool er nú á 17. plássinum í enska Championship. Trý stig eru niður til niðurflytingarstrikuna.